**Eyka býráðsfundur mánadagin 10. mei 2012 kl. 20.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Sonja á Líðarenda, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Svenn Olsen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| **1.** | **12/00175**<br>**Støðutakan til útbyggingina av frítíðar-heiminum á Gásamýri**<br>Meirlutin í trivnaðarnevndini, Hanna Jensen og Páll Isholm mæla til at útbyggja Frítíðarheimið á Gásamýri, vísandi til frágreiðing og tekning hjá arbeiðsbólkinum. Uppskotið fevnir seg um umbygging av kjallarahædd í kommunuskrivstovnui, millumbygningur (verandi Gásamýri og kommunuskrivstovu), umbygging av verandi Gásamýri og ein nýggjan bygning, sum verður bygdur afturat verandi Gásamýri. Minnilutin Tollakur Joensen atkvøður blankt<br><br>Tekniska nevnd mælir frá at útbyggja Frítíðarheimið á Gásamýru við grundgevingini, at kostnaðurin er ov høgur í mun til ein nýggjan bygning, at økið uttanum ikki er íroknað kostnaðin, at farleiðin millum skúlan og frítíðarheimið kann umgangast (trygdin), at stovnurin liggur uppat komandi landsvegi og at stovnurin verður nógv órógvaður undir byggitíðini.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at byggja nýggjan bygning til frítíðarheimið nærhendis skúlanum. Grundgevingin er m.a., at stovnurin fær ein bygning sum júst er bygdur til endamálið, at stovnurin liggur í nærumhvørvinum við atltiti til framtíðar orkuskipan (grøna), at stovnurin og skúlin kunnu gera brúk av sama spæliøki, at børnini verða sett av og heinta aftur á sama staði, ongin farleið millum skúla og stovn (trygdin), kostnaðurin er helst á sama støði, at tíðarætlanin fyri verkætlanina er umleið tað sama, at børnini kunnu verða á Gásamýru og Arbeiðsmanna-felagshúsinum meðan bygt verður.<br><br>Tekniska nevnd mælir til, at brúka 4,0 mill. kr. í 2012 og at fíggja restina í 2013. Somuleiðis mælir tekniska nevnd til at selja gomlu kommunuskrivstovuna og bygningin á Gásamýru. | Fyrst var atkvødd um tilmæli hjá meirlutanum í trivnaðarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen<br>Hanna Jensen<br>Jan E. Petersen<br><br>**Atkvøddi ímóti:**<br>Fríðgerð Heinesen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Páll Isholm<br>Tollakur Joensen<br>Sonja á Líðarenda<br>Svenn Olsen<br><br>Síðani varð atkvøtt um uppskoti hjá teknisku nevnd og atkvøtt varð soleiðis:<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Hanna Jensen<br>Jan E. Petersen<br>Fríðgerð Heinesen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Páll Isholm<br>Tollakur Joensen<br>Sonja á Líðarenda<br>Svenn Olsen<br><br>**Atkvøddi blankt**<br>Jóhan Christiansen<br><br>Sostatt er tilmæli hjá teknisku nevnd samtykt. |

**Eyka býráðsfundur mánadagin 10. mei 2012 kl. 20.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Sonja á Líðarenda, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Svenn Olsen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

Meirlutin í fíggjarnevndini Fríðgerð Heinesen og Hans Mourits Foldbo taka støðu til málið á býráðsfundinum. Minnilutin, Jóhan Christiansen mælir til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í trivnaðarnevndini.

**2. 12/00056**

**Bygnaðarbroytingar á dagstovnaøkinum**
Endurskoðan av býráðssamtykt tann 27. januar 2010 viðv. máli nr. **10/00590** (Umsókn frá G! Grunninum, um at brúka ovaru hæddina á Valhøll til tónleikamiðstøð) og býráðssamtykt tann 26. mars 2012 viðv. máli nr. **12/00056** (Bygnaðarbroytingar á dagstovnaøkinum).

Tónleikamiðstøðin, Grót og G! Festivalurin hava sent kommununi bræv, har boðað verður frá at ætlanin við at nýta Valhøll sum venjingarhøli er slept, og tískil eru fyritreytinar fyri omanfyri nevndu býráðssamtyktum broyttar.

Meirlutin í trivnaðarnevndini, Hanna Jensen og Páll Isholm mæla til at málið verður útsett til aðrir hølismøguleikar eru kannaðir, smb. býráðssamtykt dagf. 26. mars 2012. Minnilutin Tollakur Joensen mælir til at halda fast við býráðssamtykt dagf. 26. mars 2012.

Páll Isholm skjýtur upp at fylgja tilmæli 2 frá umsitingini um bygnaðarbroytingar.

**Atkvøður fyri:**
Hanna Jensen
Jan E. Petersen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm
Svenn Olsen

**Atkvøddi blankt:**
Jóhan Christiansen
Fríðgerð Heinesen
Sonja á Líðarenda

**Atkvøddi ímóti:**
Tollakur Joensen

Sostatt er uppskoti hjá Páll Isholm samtykt

**3. 12/00185**

**Uppskot um at kommunalir bygningar eru taks hjá frítíðar – og mentanarvirksemi í Eysturkommunu, tá ið hesir ikki verða brúktir.**
Trivnaðarnevndin mælir til at kommunalir bygningar (ansingarstovnar og skúlar) eru til taks, til frítíðar – og mentantrvirksemi, eftir nærri reglum og avtalu við umsitingina.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndin.

**4. 12/00191**

**1.viðgerð av eykajáttan til nýggjan graslíkisvøll**
Neyðugt verður at skifta undirlagið í Gøtu, og neyðugt var eisini at asfalterað unirlagið í Leirvík. Samlaði kostnaðurin av hesum verður uml. 1,8 mió harav Trygd rindar 175 t.kr.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Eyka býráðsfundur mánadagin 10. mei 2012 kl. 20.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Sonja á Líðarenda, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Svenn Olsen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 00.00**

Samlaða játtanin á fíggjarætlanini er 2 mió. kr., men tá var ikki roknað við, at neyðugt bleiv at gera nakað av týdningi við undirlagi hvørki í Leirvík ella Gøtu.

Mett verður at neyðugt verður við eykajáttan á 1,1 mió. kr.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan uppá 1,1 mió. kr.

Eykajáttanin verður fíggjað við lántøku.

| | | |
|---|---|---|
| **5.** | **12/00139**<br>**Fólkaatkvøðan tann 3. mei 2012 um kommunusamanlegging** | Málið umrøtt. |

**Eysturkommunu býráð:**

| | |
|---|---|
| Jóhan Christiansen | ____________________ |
| Fríðgerð Heinesen | ____________________ |
| Hanna Jensen | ____________________ |
| Tollakur Joensen | ____________________ |
| Jan Erlingsson Petersen | ____________________ |
| Sonja á Líðarenda | ____________________ |
| Hans Mourits Foldbo | ____________________ |
| Páll Isholm | ____________________ |
| Svenn Olsen | ____________________ |